# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Og so hava vit tikið ein dyst í senn*
*Jón Rói Jacobsen*




*Gullveitslan byrjaði, so skjótt sum dysturin á stadion í Aalborg var av. Men hjá Jón Róa Jacobsen gekk leiðin alt fyri eitt heim til skúlatingini, sum máttu takast framum, nú próvtøka stendur á skránni*

*Mynd: Polfoto*

# Sat heima og las til próvtøku

**Meðan liðfelagarnir í AaB ballaðust og koyrdi busstúr kring Aalborg, sat Jón Rói Jacobsen heima í íbúð sínari. Klokkan átta í morgun skuldi hann nevnliga til próvtøku**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast Jón Rói Jacobsen ikki var við í hópinum, sum í gjár sparkaði gullið seinasta pettið til Aalborg, so fegnaðist hann eins og liðfelagarnir um stóra sigurin, sum nú var vunnin.

- Tað var sjálvandi keðiligt, at eg ikki var við í hópinum hesaferð, men upplivingin á stadion var heilt fantastiskt.

Og var ein løta sum hendan eisini nakað, sum tú hugsaði um, tá tú fyri tveimum árum síðani gjørdi sáttmála við AaB.

- Slettis ikki. Eg hugsaði um møguleikan at spæla í superliguni. Gullið er vanliga nakað, sum FCK og Brøndby stríðast um, so tað var ikki hetta, sum lá fremst í huganum tá.

Men hvør er so frágreiðingin uppá, at tit nú hava koppað øllum hinum?

- Eg haldi, at vit hava arbeitt ótrúliga væl saman sum ein eind gjøgnum alt árið. Undan kappingini mistu vit tríggjar profilar, og ein afturat varð seldur í vetrarsteðginum. Men vit hava alla tíðina staðið saman sum ein eind, og so hava vit tikið ein dyst í senn, sigur Jón Rói Jacobsen.

### Ikki í ball

Í gjárkvøldið og í nátt var talan um sanna gullveitslu í Aalborg. Longu undan dystinum móti Brøndby var greitt, at spælararnir skuldu busstúr kring býin, um gullið kom til høldar, og sjálvandi varð rimmar gullveitsla eisini skipað.

Men føroyski landsliðsspælarin í hópinum var tó ikki partur av hesari. Við síðuna av fótbóltinum gongur Jón Rói eisini í skúla, og her stóð próvtøka á skránni klokkan átta í morgun. Og tí ráddi um at fyrireika seg til hesa. Ein setningur, sum tó ikki var serliga hugaligur.

- Sjálvandi vildi eg gjarna verið saman við liðfeløgunum og feirað gullið í kvøld. Tað er so eingin sum helst ivi um tað. Allur hópurin hevur arbeitt øgiliga hart fyri hesum, og tað er sjálvandi keðiligt, at eg ikki kann verða við. Men eg havi so eisini gingið í skúla alt árið, og próvtøkan er nakað, sum eg noyðist at raðfesta framum, sigur Jón Rói Jaocbsen, sum tó helst fær aðrar møguleikar til gullveitslu, nú tað enn resta tvey umfør av donsku kappingini.

# FM-svimjing á Rás1

**Sum liður í nýggjum samstarvi verða svimjifinalurnar frá FM-kappingini vístar á Rás1 hjá Televarpinum**

SVIMJING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

FM í svimjing verður um vikuskiftið. Innleiðandi umførini verða svomin seinnapartin í morgin, og klokkan 18 byrja finalurnar. Leygardag eru Innleiðandi riðlar frá kl 09:30 og finalur frá kl 16:30. Og sunnudag eru innleiðandi riðlar frá kl 08:30 og finalur frá kl 15:30.

Í sambandi við árligu føroyameistarastevnuna í svimjing, sum verður í Tórshavn um vikuskiftið, hevur Svimjisambandið gjørt av at royna framleiðslu og beinleiðis sending av øllum finalum í sjónvarpi. Samstarvsavtala er gjørd við Televarpið, R2-Net og Rás 2. Finalurnar verða vístar beinleiðis á Rás 1 hjá Televarpinum, hvønn dag, og byrjað verður fríggjadagin kl 17:45. Frásøgufólk á Rás1 verða Jón Brian Hvidtfeldt og Rókur í Jákupsstovu.

- Málið er at fáa svimjingina meira fram í miðlunum – ikki minst sjónvarpi. Svimjing er øgiliga hyggjaravinarligt, og hetta er so ein roynd hjá okkum at fáa eitt størri fokus á svimjingina. Og vónandi kunnu vit í framtíðini eisini senda frá øðrum svimjikappingum, segði Palli Ziskason, formaður í Svimjisambandinum við Rás2 í gjár.